## Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# SKAL VINNA UPP Á SAMBAND

Fimtan dagar eftir exittið hjá Jóannes Eidesgaard, hava javnaðarfeløgini kosið Aksel V. Johannesen til nýggjan formann. Sum Aksel V. Johannesen fleiri ferðir hevur sagt, so er hann ikki royndur í leikum, hann er ungur familjumaður, og hann hevur sum fíggjarmálaráðharri eisini nógv onnur jørn í eldinum. Men arvurin eftir Jóannes Eidesgaard er tungur at lyfta. Hóast stóri maðurin av Tvøroyri valla tyktist knógva byrðuna, so kann ein nýggjur maður gera tað – um hann saðlar um í flokkinum. Og tað hava vit sæð fyrr.

Tjóðveldisflokkurin gjørdi tað í 1998. Tá Tjóðveldisflokkurin umsíðir varð tikin í álvara sum konstruktivur samstarvsflokkur og kom í samgongu við Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin í 1975, fánaði loysingarbroddurin hjá flokkinum burtur. Eftir at flokkurin fór at arbeiða sum einhvør annar sosialdemokratiskur flokkur, so køvdist tjóðskaparneistin nakað, og í áttati- og nítiárunum var tað eingin, sum trúði upp á einar sjálvstøðuguar Føroyar. Ikki ein gong fremstu tjóðveldisfólk. Tað var bara nakað tey hildu røður um og sungu um.

Ikki fyrr enn Høgni Hoydal – eftir at hava gjørt eina spennandi sjónvarpsrøð um, hvussu óreinir danir vóru móti føroyingunum í bankamálinum – uppfann orðið »skipað loysing«. Eftir stórsigurin hjá Tjóðveldisflokkinum á valinum í 1998, tá flokkurin vaks úr fýra upp í átta tingfólk, varð orðið »loysing« skúgvað heilt burtur, og orðið »fullveldi« kom í staðin. Hetta fyribrigdið fekk fastatøkur bæði í Fólkaflokkinum og í Gamla Sjálvstýrinum, so nú var lagað manni. Og at tað var realpolitikkur, og nakað, sum fólk í Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum eisini máttu fyrihalda seg til, varð greitt, tá fólkaatkvøðan varð útskrivað. Tey hildu ondini – líka til Anfinn Kallsberg, Fólkaflokkinum líkt, punkteraði møguleikan fyri einum sjálvstøðugum Føroyum og avblásti fólkaatkvøðuna, sum skuldi verða 26. mai í 2000.



Aksel V. Johannesen hevur proklameraõ, at Javnaðarflokkurin er ein »samríkjaflokkur«. Bara vendingin »samríkjaflokkur« vísir, at hann ikki meinar tað akkurát soleiðis, og at flokkinum tørvar eitt nýtt hugtak, eins og Tjóðveldisflokkurin í 1998. Tað nyttar einki hjá Akseli at kopiera Sambandsflokkin. Hann má finna upp á okkurt nýtt. Okkurt, sum fær fólk at fylkjast um »samríkjahugsjónina« upp á ein fiksari máta, so kann hann vinna sigrar.

**Tað nyttar einki hjá Akseli at kopiera Sambandsflokkin**



## Grýlurómur á Argjum

Í dag var sannur grýlurómur á Argjum, nú tey fyri seinastu ferð hava hildið føstulávint á Argja Skúla, sum letur aftur í summar. Eftir summarfrítíðina verður flutt í nýggjan, stásiligan skúla á Argjahamri.

Sum siður er gingu allar grýlurnar ein túr á Argjum, áðrenn farið varð upp á gólv at kvøða Stolt Signhild.

Næmingar í níggjunda flokki kjósa bestu grýlurnar, og so verður tunna sligin.



## Edmund heilsar Akseli

EDMUND JOENSEN
KJAK Á SÍÐU 14



## Planbúskapur ella skipaður marknaður

HØGNI HOYDAL
KJAK Á SÍÐU 10



## Heini slapp ikki á listan

Norðoya Tjóðveldisfelag hevur ikki rúm fyri tingmanninum Heina O. Heinesen

Tveir uppstillingarfundir hava verið í Norðoya Tjóðveldisfelag, men eingin Heini O. Heinesen er á listanum.

Hann boðaði annars herfyri frá, at hann var til reiðar at stilla uppaftur.

Heini O. Heinesen hevur í dag ikki stórvegis viðmerkingar til, at hann ikki er komin á listan. Eftir hansara fatan var tað avgjørt frammanundan, hvørji fólk skuldu á listan. Hann heldur tað annars vera løgið, um pensjonistar eru óynskir, tá ið pensionistarnir telja fjórðingin av fólkinum.

Heini O. Heinesen varð fyrstu ferð valdur í løgtingið í 1984 og sat til 2004. Tá fall hann fyri Karsteni Hansen. Men hann varð valdur inn aftur í 2008 við 415 atkvøðum og sum nummar seks av átta tjóðveldisfólkum.

**Sosialurin**

Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*